**Vindrøkt Sp/f**
**Att.: Jóhan í Niðristovu, stjóri**

Tórshavn 22. januar 2019

# Viðvíkjandi útboði í Neshaga og Húsahaga

Tað hevur verið nógv frammi í seinastuni at skilja el-netið frá SEV. Eitt av høvuðsargumentunum fyri hesum hevur verið at tryggja reella kapping á elframleiðsluøkinum. Hinvegin hava SEV og onnur ført fram, at vit longu hava kapping á økinum, og hava útboðini í Neshaga og Húsahaga tryggjað, at kapping er um at framleiða el inn á føroyska el-netið.

SEV hevur vunnið øll útboð, sum higartil hava verið. Vinnarin hevur verið tann, sum hevur kunna bjóðað lægsta søluprísin fyri kwt inn á netið.

Kravið í sambandi við útboð hevur verið, at el framleiðslan skal liggja í sjálvstøðugum juridiskum eindum. Tó bjóðaði SEV sjálvt og legði síðani vindmyllurnar í sjálvstøðugar juridiskar eindir.

Henda tilgongd hevur gjørt, at kappingarneytar hjá SEV hava ivast í, um útreiðslur liggja eftir í SEV aftaná, at vindmyllurnar eru fluttar í sjálvstøðugar juridiskar eindir. Og harvið hevur ikki verið talan um reella kapping í sambandi við tey útboð, sum hava verið.

NUMO er biðið um, at gjøgnumganga byggiroknskap, framleiðsluroknskap, metingarfrágreiðing, byrjunarfíggjastøðu og roknskapirnar fyri juridisku eindirnar, sum vindmyllurnar eru fluttar yvir í.

Vit hava tí vísandi til lógina um alment innlit umbiðið fylgjandi tilfar fyri Neshaga og Húsahaga:

- Byggiroknskap
- Rakstrarroknskap fyri tíðarskeiðið vindmyllurnar lógu í SEV
- Metingarfrágreiðing í sambandi við at vindmyllurnar vórðu innskotnar í dótturfelag
- Roknskapir fyri dótturfelag
- Avstemman av byggiroknskapi til rakstrarroknskap fyri tíðarskeiðið vindmyllurnar lógu í SEV

**NUMO, GÓÐKENT GRANNSKOÐANARVIRKI SP/F**
Postsmoga 1165 | FO-110 Tórshavn | Postsmoga 144 | FO-710 Klaksvík | Tel 20 13 13 | numo@numo.fo | numo.fo

- Avstemman av rakstrarroknskapi fyri tíðarskeiðið vindmyllurnar lógu í SEV til byrjunarfíggjarstøðu fyri dótturfelag

SEV hevur síðani latið okkum hetta tilfar:

**Neshagi:**

- Byggiroknskap
- Roknskap fyri 2015 ið inniheldur tøl fyri 2012-13 og 2014
- Metingarfrágreiðing
- Roknskapir fyri 2016 og 2017
- Avstemman av byggiroknskapi til rakstrarroknskap
- Avstemman av rakstrarroknskapi 2014-15 til byrjunarfíggjarstøðu

**Húsahagi:**

- Byggiroknskap
- Roknskap fyri 2014-15
- Metingarfrágreiðing
- Roknskapir fyri 2016 og 2017
- Avstemman av byggiroknskapi til rakstrarroknskap
- Avstemman av rakstrarroknskapi 2014-15 til byrjunarfíggjarstøðu

Stutt kann sigast, at SEV hevur vunnið bæði útboðini og hevur í fyrsta umfari lagt vindmyllurnar í sjálvstøðugar deildir í SEV roknskapinum. Síðani eru vindmyllurnar fluttar í sjálvstøðugar juridiskar eindir undir nøvnunum P/F Vindfelagið í Neshaga og P/F Vindfelagið í Húsahaga.

Mannagongdin fyri meting av innskotnu fyritøkuni/vindmyllunum er, at SEV hevur ásett virðið av innskotnu aktivunum. Hetta virðið er ásett við støði í deildarjavnanum í bókhaldinum hjá Elfelagnum SEV pr. 31. desember 2015, og er materiella støðisognin (vindmyllurnar) innroknað í dótturfeløgini við støði í grannskoðaðum deildarroknskapi pr. 31.12.2015. Grannskoðarin hjá SEV hevur gjørt og undirskrivað metingarfrásøgnina, sum vísir virðir svarandi til roknskaparlig virði pr. 31. desember 2015. Aftaná hevur grannskoðarin hjá SEV grannskoðað roknskapin hjá dótturfeløgunum. Spurningur kann helst setast við, um talan er um óheftar metingar, tá ein skal meta um egnar metingar.

I stuttum hava vit staðfest í okkara gjøgnumgongd av móttikna tilfarinum viðvíkjandi Neshaga:

- Byggiroknskapurin vísir ein samlaðan byggikostnað á 50,0 mió. kr., meðan framleiðsluroknskapurin vísur 49,1 mió. kr. Munurin á 0,9 mió. kr. millum byggiroknskapin og útveganarvirðið í framleiðsluroknskapinum er renta í byggitíðini, sum ikki er ognarførd, men útreiðsluførd hjá samtakinum. Harvið liggja 0,9 mió. kr. eftir í SEV, tá vindmyllurnar vera fluttar yvir í dótturfelagið.
- Fyri 2013 er talan um 14 mánaðir við inntøku frá elsølu samsvarandi við, at vindmyllulundin alment bleiv tikin í nýtslu í november 2012. Fullar avskrivingar eru tó tiknar við sum útreiðsla í 2012, hóast elsølan bert er frá november 2012. Árligar avskrivingar eru 3,0 mió. kr. Avskrivingarnar eru tí 2,5 mió. kr. ov høgar

í 2012. Harvið liggja 2,5 mió. kr. eftir í SEV, tá vindmyllurnar verða fluttar yvir í dótturfelagið.

- Avskrivingar eru gjørdar fyri 3,0 mió. kr. í 2015 samsvarandi nýtta roknskaparháttinum í 2015, sum er sama støði sum í 2014. Harumframt er niðurskriving gjørd fyri 2,5 mió. kr. í sambandi við sølu av gomlu Vestasmylluni, sum var tikin niður í 2012. Tilsamans er av- og niðurskrivað fyri 5,5 mió. kr. í 2015. Harvið liggja 2,5 mió. kr. eftir í SEV, tá vindmyllurnar verða fluttar yvir í dótturfelagið.

Sostatt hevur SEV tikið eitt samlað tap upp á 5,9 mió. kr. í sambandi við vunna útboðið av elframleiðsluni frá vindmyllum í Neshaga. Hetta svarar til 11,8% av byggikostnaðinum á 50,0 mió. kr.

Vit hava eisini gjøgnumgingið móttikna tilfarið viðvíkjandi Húsahaga. Nærum sama mynstur er galdandi fyri Húsahaga, og tí verður ikki gjørt meira burturúr Húsahaga í hesum skrivi. Samlaða tapið hjá SEV í sambandi við at flyta vindmyllurar í dótturfeløgini er tískil munandi størri enn tær 5,9 mió. kr.

Sum nevnt er henda gjøgnumgongd grundað á omanfyri nevnda móttikna tilfar og fyrispurningar til SEV. Okkara niðurstøða er tengd at hesum.

Um tygum hava spurningar ella viðmerkingar til omanfyri nevnda tilfar, eru tygum vælkomin til at seta tygum í samband við okkum.

**Vinaliga**




Bjarni Arnason, stjóri
NUMO, góðkent grannskoðanarvirki Sp/f